

[www.oljan.fo](www.oljan.fo)

**Jan Müller** 03 - 12 - 2012

# Føroyskir vinnumøguleikar í Arktis

Friggjadagin var heldur óvanligur fundur í Vinnuhúsinum í Havn við luttøku av fleiri av limunum í Oljuvinnufelagnum og øðrum við áhuga fyri og tilknýti til arktiska økið. Frágreiðing, sum Oljuvinnufelagið hevur fingið gjørt, varð løgd fram fundinum. Tað er Syntesa, sum vegna Oljuvinnufelagið hevur gjørt kanningina av vinnuligum møguleikum í Arktis. Ólavur Gregersen legði frágreiðingina fram. Hann tók samanum broytingarnar á siglingarleiðunum norðeysturum og norðvesturum Norðpólin. Hóast leiðirnar nú bert eru ísfríar nakrar mánaðir um árið, so broytist hetta rættuliga skjótt. Hetta gevur møguleikar til føroyska vinnu, sum er sterk innan maritima økið, og sum eisini hevur førleikar innan sigling í truplu høvunum norðan fyri okkum. Afturat hesum gevur smeltandi ísurin grundarlag fyri nógvum stórum verkætlanum, har føroyskar fyritøkur kunnu vera partur, millum annað i Grønlandi. Yvirhøvur eru nýggir vinnumøguleikar innan náms-, olju-, ferða- og fiskivinnu. Økta virksemi norðan fyri Føroyar kann eisini skapa virksemi á landi í Føroyum, um rætt verður borið at. Skal føroysk vinna fáa ágóðan av hesum, mugu bæði vinna og myndugleikar tilvitað leggja seg eftir at fáa ágóðan av hesum møguleikum. Í frágreiðingini verður mælt til at - fylgja sertifiseringsarbeiðinum, ið fer fram í altjóða høpi, - samstarva við grønlendskar politikarar og embætisfólk, - áhaldandi styrkja um føroyska luttøkuna í Arktiska Ráðnum, - føroysk umboð eru við á altjóða handilsferðum um Arktis - skipa fyri handils og kunningarferð vestur í hav Umframt hesi tilmæli var á fundinum nevnt, at tann skattaavtala, sum Føroyar hava við Grønland, eigur at verða dagførd og betrað munandi. Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum, tók stutt samanum, og endaði við at siga, at tað er týdningarmikið, at vit velja at vilja vera við, og at vit velja eitt ella nøkur fá fokusøki. Hetta er galdandi fyri bæði vinnu og myndugleikar.

Luttakararnir til framløguna vóru samdir um at arbeiða víðari við at gera Føroyar til ein veitingarmiðdepil og at fáa í lag eina vinnuferð til Grønlands. Hetta verður í fyrstu syftu gjørt undir Oljuvinnufelagnum, men tað er týdningarmikið at eisini føroysku myndugleikarnir, sum frálíður gerast partur av hesum skrivar heimaiðan hja Vinnuhusinum. Frágreiðingin Vinnuligir møguleikar í Arktis kann lesast a heimasiðuni www.industry.fo Myndir Fra fundinum Vinnuhusinum. Myndatøka oljan.fo/Jan Muller